# Fría skúlaorðið

**Skúlafólk siga sína hugsan um fólkaskúlan og aðalorðaskiftið í tinginum týsdagin**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Trongligt var á áskoðarabenkrunum undir aðalorðaskiftinum í gjár. Onkur mátti standa, meðan onnur sótu á gólvinum og á trappuni. Millum áhoyrararnar vóru, sum vera mann, nógv skúlafólk. Onkur teirra lýddi á orðaskiftið allan dagin, meðan onnur sótu eina løtu. Sosialurin heitti á nøkur teirra, um at skriva nakrar tankar um, hvat tey fingu burtur úr orðaskiftinum, sæð úr sjónarhorni teirra.

Vit góvu teimum nakrar leiðbeinandi spurningar, men tað stóð teimum frítt, at byggja viðmerkingina upp, sum teimum lysti.



Jóannes Hansen, rektari á Læraraskúlanum

## Dygd má fáast fyri pengarnar

Eg haldi, at tað undir orðaskiftinum í tinginum í dag kendist eitt álvarsemi og nærlagni, sum tað sjáldan ella kanska ongantíð kennist at hava verið størri. Landsstýrismaðurin hevði lagt væl gjøgnumarbeitt upplegg fyri tingið í so mikið góðari tíð, at løgtingsmenn høvdu góðar møguleikar at fyrireika seg. At politikararnir høvdu gjørt lektiir, hoyrdist á orðaskiftinum, sum eisini var grundað á frágreiðingini, sum PISA bólkurin hevði gjørt.



Eg hefti meg við tað, sum serliga hevur við Læraraskúlan at gera. Ætlanin sigst nú vera, at lógararbeiðið í sambandi við nýggja lóg fyri læraraútbúgving og pedagogútbúgving skal fyrireikast nú beinanvegin. Hetta skal gerast sambært álitinum, sum varð handað landsstýrismanninum síðsta summar.

### Síggja fram til nýggju lógina

Tað kom fram í tinginum, at fyrireikingarnar til lógina og lógararbeiðið skal gerast í ár, soleiðis at tað longu á sumri í 2008 kunnu takast lesandi inn sambært nýggju lógini. Tað síggja vit á Læraraskúlanum fram til. Tað gera vit, tí lógin fyri læraraútbúgving skjótt verður 27 ára gomul, og tí tað eingin lóg er fyri pedagogútbúgvingina, sum er sambært grein í læraraskúlalógini, sum sigur, at aðrar útbúgvingar kunnu setast á stovn sambært hesi lógini. At lógin verður dagførd, og at kunngerðir og lesiætlanir kunnu gerast við støði í nýggjari lóg, fer sjálvandi at gera arbeiðið hjá teimum lesandi, lærarum, umsiting og MMR bæði greiðari og léttari.

### Eftirútbúgving ein fortreyt

Eg hefti meg eisini við, at tað í tinginum tóktist vera undirtøka fyri, at servitanin innan innskúling og byrjunarlesing verður styrkt, og at fólk verður sett í starv á Læraraskúlanum at samskipa námsfrøðiliga gransking og kunning um úrslit av námsfrøðiligari gransking, sum gongur fyri seg aðra staðni, út til føroyska samfelagið og føroyska skúlan. Hetta fer at brynja okkum at bjóða lærarum eftirútbúgving innan eitt nú byrjunarundirvísing og byrjunarlesing. Sovorðin eftirútbúgving til lærarar, og tað fer aftur at bera við sær, at tað fer at bera til at fáa størri úrtøku burturúr øktu upphæddunum, sum vónandi fara at verða játtaðar til skúlaøkið. Hetta haldi eg hevur alstóran týdning. Serliga tá ið ætlanin er, at tímatalið í yngstu flokkunum skal økjast markant. Um tey, sum skulu fáast við yngstu skúlabørnini, ikki verða uppkvalifiserað, so er vandi fyri, at tað ikki fæst fyri pengarnar, sum tað verður væntað og vónað skal fáast burturúr.

### Síggjast á fíggjarlógini

Sjøtul er ivaleyst settur á fyrireikingarnar til fíggjarlógini fyri 2008. Í tinginum í dag var breiður áhugi fyri at bøta um skúlan. Hvussu stórur viljin at bøta um skúlaskapin í Føroyum er og verður, fer ikki minst at síggjast á, hvussu tað verður við játtanini. Nú fáa vit at síggja! Politiski viljin fevndi yvir allar flokkar – í samgongu og andstøðu. Tað fer eisini at hava týdning, tá ið samgonga skal skipast og samgonguskjal orðast eftir løgtingsvalið, sum verður í seinasta lagið leygardagin 19. januar 2008.

Jákup av Skarði, lærari og ráðgevi

## Fólkaskúlin – nakar bati, nøkur fyrimynd?

So sat eg har og hugdi at einum ógvuliga rokutum bólki. Tilfeingið var í ymsum aldri, ymiskt í støðd og ymiskt var hvussu tey fylgdu við í aktuellu støðuni. Satt at siga ivaðist eg í, hvussu stórur partur mundi vita hvat gekk fyri seg. Onkur reikaði frá stóli til stól, onkur prátaði um leyst og fast og mín sann um ikki onkur prátaði í fartelefon.

Eitt er vist, órógvar fartelefonin mína undirvísing, so skulu foreldrini heinta telefonina hjá skúlastjóranum. Men her var ikki talan um skúlaflokk við næmingum við serligum tørvi. Nei. Løgtingslimir høvdu fólkaskúlan á dagsskrá og hetta fekk eg burturúr…

### Jalig hugsan

Tó at fáir tinglimir sýntust at lurta, so vóru nógv framsøgufólk, ið høvdu gott at bera fólkaskúlanum – bæði í góðum røðum og í konstruktivum viðmerkingum. Onkur hevði á orði, at peningur skuldi játtast eftir tí tørvi mettur var at betra skúlan. Onkur annar var hóvligari og helt at peningur skuldi játtast so líðandi: 2 milliónir nú, 2 milliónir seinni o.s.fr.

Eisini í prátinum um fleiri tímar til innskúlingina, sýntist at undirtøka var, tað var eins og vit sjálvsagt skuldu lata næmingar verða eins leingi í skúla og børnini í grannalondunum. Skilti hugburðin nakað soleiðis, at flestu børnini vóru á stovni stóran part av degnum, tí var tað so líkatil at lata tey verða meira í skúla. Mær dámdi eisini væl, at møguleikin fyri samstarvi millum lærarar og námsfrøðingar var nevndur.



Tó helt eg tað vera harmiligt, at politikkarar vildu hava foreldrini at kunna fylgja skúlagongdini og taka ábyrgdina á seg - at fylgja við, at børnini fingu góða undirvísing – samstundis sum politikkarar vildu hava børnini longri í skúla, tí annars sótu tey bert framman fyri teldu í fríløtuni. Hvar er tá álitið á foreldrini? Kunnu vit heldur leggja størri part av starvinum hjá læraranum til at røkja samstarvið millum heim og skúla og harvið í dialogi lætta foreldrunum um møguleikan at fylgja gongdini og stimbra barninum?

### Politikkur og ítøkilig tiltøk

Eins og løgtingsmaður nevndi, so hevði verið áhugavert at sæð ítøkilig tiltøk nú vit hava PISA-kanning og nógv prát um átøk, ið kunnu styrkja fólkaskúlan. Eisini hevði verið áhugavert at sæð ítøkilig tiltøk, tó at tey kosta. Tað eru ikki nógvir trupulleikar, ið verða loystir við teimum fíggjarligu kørmum fólkaskúlin hevur nú.

Mentamálaráðharrin hevur fingið greiðar framløgur og viðmerkingar, ið – um politikkarar meintu tað sagt varð – eru grund undir at seta ynski fram um milliónaupphæddir her og nú.

### Okkurt at raðfesta fremst

Sum ein fylgja eftir øll tey frálíku tiltøkini strategibólkurin nevnir, hevur tað verið róð framundir at tað ikki ber til at seta alt í verk og tí skulu politikkarar velja ávís tiltøk, ið eiga at verða raðfest frammalaga.

Men eftir orðaskiftinum í dag, er týðiligt at nógvir politikkarar eru greiðir um, at skulu vit styrkja fólkaskúlan, er ikki nóg mikið bert at fokusera á nøkur fá øki og heldur ikki bert á tey, ið verða mett einki at kosta.

### Kt

Eitt, ið eg – sum formaður í kt-varðafelagnum – ynski at leggja fram her, er kt-økið. Gamaní eru íløgur gjørdar í amboð og ávísa eftirútbúgving, men vit eru langt frá komin á mál.

Í práti um kt og serliga um farteldur, hevur ofta verið prátað um, at hvør næmingur skal halda á sínari farteldu. Men til hvørja nyttu, tá ið næmingar duga betri at nýta teldu enn lærarin? Tó at eg haldi, at næmingurin eigur munin í nógvum spølum, so eri eg fullvísur í, at nógvir lærarar duga betri at nýta telduna á skynsaman hátt í skúlahøpi – vit hava námsfrøðiligu útbúgvingina!

Kt er stórt/breitt øki, í stórari menning, og tí er tørvur á skeiðum og eftirútbúgving, eins væl og tørvur er á at lata hvønn einasta lærara fáa sína farteldu um talan skal vera um at kt verður natúrligur partur í fólkaskúlanum.

Við ynskjum um góðan fólkaskúla – øllum at frama.